TAKS

P/F EIK BANKI
YVIRI VIÐ STROND 2
POSTBOX 34
110 TÓRSHAVN

| | |
|---|---|
| Dagfest: | 22. juni 2015 |
| J.nr.: | 13/55908-6 |
| P-tal/V-tal: | 589306 |
| Tygara skriv: | |

Att.: Suni Schwartz Jacobsen, forstjóri
og Ole Guldborg Nielsen, figgjarstjóri

**Ætlanarskriv fyri 2011 til Eik Banka, V-tal 589306**

**TAKS ætlar at hækka skattskyldugu inntøkuna hjá Eik Banka fyri 2011 við frádrignum undirbalanca 477.419.872 kr. frá –657.028.300 kr. til -179.608.428 kr.**

Eik Banki hevur greitt frá, at Í tíðarskeiðnum frá 1. oktober og fram til februar 2011 framdi nýggi Eik Banki fleiri broytingar, sum við tilvísing til IFRS (roknskapreglur) vóru framdar umvegis eginognina. Broytingarnar komu í høvuðsheitum av, at ognir vóru fráseldar við tapi, samstundis sum eitt nú útlán vóru mett verri enn upprunaliga virði. Talan var um 514 mill. kr., harav bankin dróg tær 477 mill. kr. frá á skattauppgerðini fyri 2011. Upplýst er, at av eyka niðurskrivingum eru 122 mill. kr. afturførdar í 2011.

Lógardeilin hjá TAKS boðaði 28. juni 2013, at Eik kundi gera broytingar aftur í tíð, um Eik helt seg innan fyri freistirnar í Toll- og skattafyrisitingarlógini.

TAKS hevur 16. apríl 2014 biðið um m.a. nýggjan skattaroknskap fyri 2011.

Eik banki hevur tó ongan nýggjan skattaroknskap sent inn fyri 2011, men svarað, at fatanin er, at sjálvuppgávan fyri 2011 er rætti hátturin at seta sjálvuppgávuna upp. Tí er roknskapurin settur upp samsvarandi hesum. Bankin sigur, at hann sá ikki svarið frá Lógardeildini hjá TAKS sum at útreiðslurnar skuldu viðgerast sum skattligt good-will.

TAKS hevur síðan viðgjørt spurningin, og niðurstøðan er, at útreiðslurnar skulu viðgerast sum skattligt good-will. Undirbalancan skal viðvíkja virksemi í Føroyum fyri at verða viðgjørt sum skattligt good-will, ið kann avskrivast sambært § 35a, stk. 2 í skattalógini.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

TAKS

Við einum skattskyldugum handli av ognum og skyldum frá einum peningastovni í somu støðu sum gamli Eik banki var í, er keypssummurin virðið av teimum skyldum, sum tann yvirtakandi peningastovnurin yvirtekur. Við yvirtøku av einum undirbalanca er hesin eisini partur av yvirtøkuni, og skal fordeilast.

Hetta er grundað á, at Danska Skattamálaráðið hevur úttalað, at undirbalancan er gjald fyri kundaskaran hjá tí neyðlíðandi bankanum, og tí kann metast sum gjald fyri good-will knýtt at teimum yvirtiknu engagementunum. Undirbalancan skal sum nevnt viðvíkja virksemi í landinum.
Ein skattlig undirbalanca er ikki tað sama sum ein roknskaparlig undirbalanca. Í Føroyum er ongin virðisásetingarnevnd, sum tað er í Danmark, ið kann verða til hjálp. Tað er tí neyðugt, at Eik Banki sjálvur uppger skattligt good-will, sum kann avskrivast yvir 10 ár.

Tá Eik Banki hevur gjørt skattliga virðið av good-will upp, kann TAKS loyva, at hetta verða avskrivað við 1/10 parti frá og við 2011, sambært § 35a, stk. 2 í skattalógini.

Sigast skal frá, at TAKS ætlar at minka hallið hjá EIK fyri inntøkuárið 2010-2011 við 477.419.872 kr. frá – 657.028.300 kr. til -179.608.428 kr.

Ætlaða broytingin ávirkar framflytingina av halli til eftirfylgjandi ár.

Um viðmerkingar eru til frammanfyristandandi, skulu hesar verða TAKS í hendi áðrenn 30. juni 2015, tá endaliga álíkingin fyri 2011 skal verða framd, vísandi til freistina í 25a í § lóg um toll- og skattafyrisiting.

Vinarliga
TAKS

Poula Simonsen
Fulltrúi
Tlf. 352713
ps@taks.fo

Nicholas Nielsen
Fulltrúi
Tlf. 352694
nn@taks.fo

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
Fax 35 26 01
taks@taks.fo
www.taks.fo